







*Loft*



*Miðhædd*



*Kjallari*

# 4 tvíhús á Heygnum Mikla til sølu

Í vesturbýnum í Tórshavn er nú ein verkætlan í gerð. Talan er um eina bygging av fýra tvíhúsum á Heygnum Mikla, sum væntandi verða liðug á sumri 2008.

Húsini verða í trimum hæddum. Í miðhæddini er gongd, baðirúm, køkur og stova við altan. Á loftinum eru trý kømur og eitt stórt baðirúm. Kjallarin verður óinnrættaður, tó verður niðurgongdin frá miðhæddini gjørd.

Vindeyguni verða hvít við gjøgnumgangandi sprossum. Úthurðarnar og innhurðarnar verða hvítar og sléttar. Óviðgjørdar fyllingshurðar kunnu fáast fyri sama prís.

Gólvini verða parket. Hiti verður í gólvinum í durinum og á baðirúmunum.

Køkurin verður ljósur – av merkinum Wellmann frá Eikini. Hvítvørur eru íroknaðar.

Í baðirúminum í miðhæddini verður brúsa og í baðirúmið á loftinum verður baðikar. Gólvini verða sveisað vinyl.

Húsini hava vanliga oljufýring, men hevur tú eitt ynski um hitapumpu kann hetta fáast fyri meirkostnað.

Á Heygnum Mikla er barnavinarligt og friðarligt. Tvíhúsini standa beint út til eitt fríøki. Her er gott bæði hjá ungum sum eldri at búgva. Fleiri vøggustovur og barnagarðar liggja í umhvørvinum. Venjingarskúlin og Læraraskúlin eru bert fáa minuttir frá og góðir innkeypsmøguleikar eru.

Samstundis er stutt til miðbýin, har tú hevur møguleika fyri at njóta alt, sum miðbýurin hevur at bjóða við hugnaligum matstovum, mentanarlívi, søvnum og handlum.

Tú fært meira at vita um tvíhúsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 2008 |
| Hæddir: | tríggjar |
| Stødd innan: | 174 fermetrar |
| Grundøkið: | 300 fermetrar |
| Prísuppskot: | kr. 2.600.000 |

skyn

**Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo**